

# Vestmenningur og Fram skulu leingjast

**Tummas Christophersen, reiðari, sigur, at Vestmenningur og Fram skulu leingjast 7,5 metrar, og arbeiðið skal gerast á Tórshavnar Skipasmiðju**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Reiðaríið, sum eigur partrolararnar, Vestmenning og Fram, sum eru fyrrverandi Hádegisklettur og Stígarklettur, hevur gjørt avtalu við Tórshavnar Skipasmiðju um at leingja trolararnar.

Reiðarin, Tummas Christophersen, sigur við Sosialin, at fleiri orsøkir eru til, at teir hava avgjørt av leingja skipini.

– Skipini taka ov lítið, og eisini ætla vit okkum at veiða gulllaks við skipunum.

Reiðariið hevur nevniliga gjørt avtalu við JFK-Trol um at brúka kvoturnar hjá Sjúrðabergi og Sundabergi.

– Vit taka hetta stigið fyri at hava fleiri bein at standa á, sigur Tummas.

Ætlanin er eisini at gera aðrar broytingar umborð á skipunum, og tilsamans verður talan um eina samlaða íløgu upp á einar 14 miljónir krónur.

Reiðarin sigur, at tað hevur gingið rímiliga væl hjá felagnum, og tí sær felagið seg ført fyri at gera hesa íløgu, sum eisini kemur at geva skipinum størri og betri møguleikar.

Tummas Christophersen væntar, at skipini koma at liggja ein mánaða ella so.

– Skipini skulu takast upp fyrst í apríl, og longu ein mánaða seinni skulu tey verða klár at fara aftur til fiskiskap.

Reiðarin sigur, at Tórshavnar Skipasmiðja longu er farin undir at gera sektiónirnar, sum skulu setast upp í skipini.



*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Christian í Grótinum mundi rikið á land

**Lodnan fer so nær fram við Suðurlandinum í Íslandi, at skipini royna heilt inni ímóti sandinum, tá ið veðrið er gott. Í gjár noyddist Krúnborg at seta enda á Christian í Grótinum, so hann ikki endaði uppi á landi**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var gott veður, men stór alda, tá ið nótaskipið, Christian í Grótinum, í gjár mundi endað uppi á landi undir Íslandi.

Lodnan fer nevniliga so nær fram við Suðurlandinum í hesum døgum, at skipini royna heilt inn ímóti landi.

Eyðun Rasmussen á skrivstovuni hjá Christiani í Grótinum í Klaksvík sigur, at okkurt bleiv áfatt við weirinum hjá skipinum, meðan teir vóru rættiliga nær landi.

– Veðrið var gott og eingin vindur, men stór alda var fram við landinum, har skipini royndu.

Sum Sosialurin hevur skilt, noyddist nótaskipið, Krúnborg, at seta enda á Christian í Grótinum, og hála skipið út frá aftur.

Eyðun Rasmussen heldur ikki, at nakar vandi var á ferð hjá skipi og manning.

– Lodnan gongur so nær, at ógjørligt er at fara eftir henni, tá ið álandsvindur er.

Eyðun sigur, at Christian í Grótinum er á øðrum túrinum á lodnuveiði undir Íslandi, og tann fyrra túrin høvdu teir 2.000 tons.

– Norðborg hevur gjørt tveir túrar. Tann fyrra landaðu teir í Íslandi og hin seinna í Føroyum. Teir høvdu fult skip báðar túrarnar, eini 2300-2400 tons hvønn túrin, sigur Eyðun Rasmussen.

Norðborg er nú á svartkjaftaveiði.

Lodnukvotan er lítil. Skipini eiga smá 4.000 tons í part.



*Christian í Grótinum er á øðrum túrinum á lodnuveiði undir Íslandi*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*